Heilsustýrið

Spurnakanning um skíggjanýtslu

Góðu foreldur og umsorganarpersónar

Heilsustýrið kunnar við hesum um, at skipað verður fyri einari spurnakanning um skíggjanýtslu hjá næmingum í 7. og 9. flokki. Endamálið er at kanna, um samband sæst millum skíggjanýtslu, heilsu og trivnað hjá børnum og ungum í Føroyum. Vitanin skal nýtast til heilsufremjandi og fyribyrgjandi arbeiði.

Hvat verður spurt um?

Spurningarnir snúgva seg um skíggjanýtslu yvirskipað, nýtslu av online spølum (gaming) og nýtslu av sosialum miðlum. Vit spyrja millum annað um, hvussu nógva tíð tey brúka á skíggjanum og hvat tey brúka skíggjan til.

Harumframt verða spurningar um svøvn, rørslu, sosial sambond, trivnað og sálarheilsu. Kanningin skal lýsa vanar og upplivingar hjá børnum og ungum í Føroyum og verður ikki nýtt til at hyggja at einstøkum børnum.

Hvussu fer kanningin fram?

Næmingarnar svara einum talgildum spurnablaði í skúlatíðini í tíðarskeiðinum 9. til 20. november 2026. Ein skúlatími verður lagdur av til kanningina, og lærararnir hjálpa næmingunum, um tørvur er á tí.

Kanningin er dulnevnd. Heilsustýrið sær sostatt ikki, hvør næmingur ella flokkur hevur latið svarini.

Vónandi verður undirtøkan fyri kanningini góð.

Vinaliga

Heilsustýrið